Búskapur og vinna:

## Skaturin má lække

Donsku vísmenninir mæltu fyri nøkrum døgum síðani stjórnini til at lækka skattin, og nú tekur vinnulívið undir við uppskotinum.

Ein kanning vísir, at so at siga øll arbeiðsgevarafeløgini taka undir við at lækka skattin. Grundsjónarmiðið er, at verður skatturin ikki lækkaður, verður trupult ella vónleyst at fáa fleiri fólk í arbeiði. Tað er longu stórur tørvur á arbeiðsmegi í Danmark, og allar forsagnir vísa, at tørvurin verður uppaftur størri í komandi árum.

Danska ídnaðarfelagið sigur, at tað er eisini neyðugt at broyta skattareglurnar, so fólk tíma at arbeiða meiri enn ein vanligan arbeiðsdag. Felagið sigur, at tað kann ikki vera rætt, at fólk skulu gjalda millum tveir triðingar og tríggjar fjórðingar av tí, sum tey forvinna eyka.

Arbeiðsgevarafeløg innan handverk, landbúnað, handil og tænastur taka undir við at lækka skattin. Eins og vísmenninir vísa tey samstundis á, at tær almennu útreiðslurnar bara veksa.

Vísmenninir og donsku arbeiðsgevarafeløgini eru samd um, at danski búskapurin er á veg uppeftir. Tað sæst m. a. av, at íløgurenar í danska vinnulívinum eru veksandi.

## Sterkari evra

Eftir at hava havt eina heldur trilvandi byrjan tykist felags evropeiska gjaldoyrað, evran, at hava fingið fótin fyri seg. Í gjár var kursurin á evruni 0,936 dollara, og so høgan kurs hevur evran ikki havt seinastu 14 mánaðarnar. Serliga seinasta heyst stóð evran seg illa móti dollaranum, og eitt skiftið kom virðið niður á 0,82 dollara. Búskaparfrøðingar halda, at evran nú er komin í eina trygga legu, og at hon hevur fingið fótin fyri seg.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Samanbrestir í Kashmir



*Indiski herurin hevur styrkt vaktarhaldið eftir álopið á løgreglustøðina gjáranáttina. Her er ein indiskur hermaður á varðhaldi við Srinagar*

**Tríggir indiskir løgreglumenn lógu eftirá, tá vápnaðir muslimar lupu á eina løgreglustøð.**

KASHMIR
*Árni Joensen*

Álopið á indisku løgreglustøðina var gjáranáttina. Tríggir løgreglumenn doyðu, og indisku myndugleikarnir ivast ikki í, at tað vóru muslimskir loysingarmenn, sum søktu atstøðini.

Beint eftir álopið brustu skotbardagar á millum indiskar og pakistanskar hermenn. Skotbardagarnir vardu til út ímóti lýsingini, men einki varð sagt um, at nakar hermaður lá eftirá. Bardagarnir vóru í Dola, sum er eitt fjallaøki, har muslimskir loysingarmenn javnan hava gjørt um seg seinastu tíggju árini.

Fyri fjúrtan døgum síðani doyðu 31 fólk, tá ein indisk hermannalega varð álopin. Eisini tá vildu indisku myndugleikarnir vera við, at álopsmenninir vóru muslimskir loysingarmenn.

India vil vera við, at Pakistan hjálpir loysingarmonnunum, og í gjár heitti amerikanska stjórnin á Pakistan um at steðga álopunum hjá loysingarmonnunum. Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, hevur víst aftur, at land hansara hjálpir teimum vápnaðu loysingarmonnunum í Kashmir.

# Ísrael verjir sína framferð

**Ísraelski sendiharrin í Danmark, Carmi Gillon, vísir aftur atfinningum frá donskum politikarum, sum mótmæla viðferðini, sum palestinski leiðarin, Marwan Barghouti, fær í einum ísraelskum fongsli.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Ísraelski sendiharrin í Keypmannahavn, Carmi Gillon, verjir nú avgerðina hjá ísraelsku myndugleikunum at handtaka palestinska leiðaran Marwan Barghouti og at seta hann í fongsul, so hann kann avhoyrast. Danska stjórnin hevur mótmælt, tí sambært upplýsingum, sum stjórnin hevur fingið, fær Barghouti ikki ta viðferð, sum altjóða reglur tryggja honum.

Carmi Gillon, sendiharri segði í gjár, at avhoyringarnar av Barghouti hava givið ísraelsmonnum ómetaliga týðandi upplýsingar, og at hesar upplýsingar hava bjargað nógvum ísraelskum mannalívum.

Sambært sendiharranum hevur Marwan Barghouti undir avhoyringunum viðgingið, at hann hevði beinleiðis ábyrgdina av í hvussu er seks palestinskum sjálvmorðsbumbuatsóknum. Hesi álopini kostaðu sambært sendiharranum 13 ísraelsmonnum lívið, og 105 onnur vórðu særd.

Carmi Gillon, sendiharri sigur, at avgerðin at handtaka Barghouti miðskeiðis í síðsta mánað var ein liður í royndunum hjá ísraelsku myndugleikunum at verja sínar borgarar og at tryggja teimum tað mest einfalda av øllum mannarættindum, rættindini at liva. Sambært sendiharranum skal Barghouti hava havt samband við uppaftur fleiri atsóknir enn tær seks sjálvmorðsbumburnar.

### Reglur skulu haldast

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, segði í gjár, at eftir teimum upplýsingum, sum uttanríkisráðið hevur fingið, fær Marwan Barghouti ikki ta viðferð íísraelska fongslinum, sum altjóða reglur tryggja honum.

– Eg kann ikki siga, hvønn leiklut hann hevur havt í sambandi við yvirgang, og um tað er tí, at ísraelsmenn hava tikið hann. Men eg kann staðfesta, at maðurin hevur stóran politiskan týdning og stóran týdning fyri palestinska fólkið, segði Per Stig Møller.

Uttanríkisráðharrin segði seg vóna, at Marwan Barghouti fær ta viðferð, sum hann eigur at fáa sambært galdandi reglum, sama um hann er fongslaður fyri yvirgang ella ikki.

Úr Norðurlondum:

## Bornholm ein eind

Fólkið á donsku oynni Bornholm valdi mikudagin eitt ráð, sum skal stýra oynni, eftir at meirilutin av fólkinum í fjør tók undir við, at oyggin verður ein kommuna. Valúrslitið gav tí óhefta borgaralistanum níggju ráðslimir, meðan sosialdemokratarnir og Vinstri fingu hvør sínar átta. Hjá Vinstra var valið sera vánaligt, tí flokkurin misti heili 16 prosent av sínum atkvøðum. Teir báðar seinastu ráðslimirnar fyri SF og Kristiligi Fólkaflokkurin.

Longu valkvøldið samdust borgaralistin og sosialdemokratarnir um at skipa samgongu, og til tann fyrsta Bornholm-borgarstjóran valdu flokkarnir borgarstjóran í býnum Rønne, Thomas Thors.

Kommunusamanleggingin á Bornholm er tann størsta, sum higartil er framd í Danmark. Tosað hevur verið um samanlegging aðrastaðni, men eins og í Føroyum tekur slíkt drúgva tíð.

## Flaggstríð

Seinastu tíðina hevur stríð verið um, hvørs uppgáva tað er at tryggja, at danska flaggið veitrar á markinum millum Danmark og Týskland, men nú hevur løgmálaráðið gjørt av, at løgreglan skal hava uppgávuna.

Í mong ár hava tey norðurlendsku fløggini veitra á danska markinum í summarhálvárinum, men nú siga donsku løgreglumenninir, at teir fara bara at toga tað danska flaggið upp í flaggstongina á markinum. Fleiri danskir politikarar finnast at løgregluni. Fólkatingsmaðurin Kaj Ikast, sum eisini er limur í Norðurlandaráðnum, sigur, at hann góðtekur ikki avgerðina hjá løgreglumonnunum, og at hann ætlar sær víðari við málinum.

Enn hevur løgmálaráðharrin, Lene Espersen, ikki boðað frá, hvat hon fer at gera.



**HEILSANIR**



Ja Jóhan. Nú eru tey fyrstu 30 árini gingin. Betri eydnu tey næstu 30. Tillukku við piparinum.
**Heilsan Pól við timburmonnunum í Dalagøtu**



Ja Jóhan. Nú hevur tú sovið 30 ár burtur! Nú má tað »ske« okkurt piparkongurin.
**Heilsan BA**



Tann 30. mei 1972 varð hesin drongurin borin í heim! Nú hongur alt í einum tunnum tráið. 30 ár - brotnan bil og onga damu. Tillukku við degnum.
**Heilsan manningin á »Fagrenni«**



**Góða Súnfríða**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Gott vit vóru til staðar, so hasin »tilbiðarin« ikki fór avstað við tær. Takk fyri ein góðan túr.
**Heilsan ferðalagið**



Á vitjan hjá systkinabørnunum. Tey siga eisini tillukku



Her ert tú ungur og penur (og tosar sum vanligt í »telefon«.) Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum.
**Heilsan Reyði**



**Góða Malan**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum 30. mei. Harrin signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, babba og Elisabeth**



**Góða lølla mostur**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum í dag. Takk fyri at tú ert so góð við meg. Eg elski teg. P.S. Kanska tú brúkar forkert »agn«???
**Heilsan Búgvi**



**Góða Sølvá!**
Hjartaliga tillukku á 25 ára degnum ídag og bestu ynskir fyri framtíðini.
**Blíðar heilsanir frá okkum øllum Katrin og Halgerð**



**Niels Østerø**
Tillukku við 85 ára degnum. Vit gleða okkum at koma norður. Góðan byrð í framtíðini.
**Heilsan Østerø-familjan á Dalavegnum**



**Góða lítlasystir og svágur**
Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum sum var tann 28. mei. Ja, 25 ár er ikki 25 dagar. Alt gott í framtíðini.
**Ynskja Peter og systir tín**



**Jógvan og Irmgarð á Lað**
Tykkum verður ynskt hjartaliga tillukku á tvífføldu 80 ára føðingardøgunum.
**Ynskja børn, familja og vinir**



**Góði babba**
Fínur sum altíð hjartaliga tillukku við 40 ára degnum.
**Vit 4**



Ein øgiligur fongur! Nær verður konufólkið fangað? Tillukku við piparinum
**Heilsan vit í spunslinum**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«